# Viðtøkur felagsins

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar 2020

**INNIHALD**

Navn og endamál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3
Limir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Rættindi og skyldur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
At siga seg burtur úr felagnum . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Útihýsing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Limagjald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Álitisfólk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Valrættur, valbæri og uppgávur . . . . . . . . . . . . . . . . 10
Stýrið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
Starvsskipanin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Starvsøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Aðalfundurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Uratkvøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
Lesandi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18
Fakligir áhugabólkar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
Samband við onnur feløg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
Roknskapur og grannskoðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . 21
Trygdargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22
Hjálpigrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23
Studningsgrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
Menningargrunnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25
Vøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
Fráboðan um arbeiðssteðg. . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
Tulkingarspurningar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
Broyting av viðtøkum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Avtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
Gildi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

## NAVN OG ENDAMÁL

### §1.

Navn felagsins er Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er óheft partapolitiskt.

### §2.

Endamálið hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er at savna sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum at taka sær av teirra fakligu, lønar-, setanar- og fyriskipanar áhugamálum umframt at fremja gott samanhald felagsliga.

## LIMIR

## §3.

**1. stk.** Upp í felagið kunnu verða tiknir sum virknir limir: Sjúkrarøktarfrøðingar, ið sambært fyriskipan nr . 353 frá 1959 við seinni broytingum hava rætt at virka sum sjúkrarøktarfrøðingar, og sum arbeiða í Føroyum. Sjúkrarøktarfrøðilesandi, sum útbúgva seg í Føroyum sambært omanfyri nevndu fyriskipan. Útlendskir sjúkrarøktarfrøðingar, sum útbúgva seg í Føroyum fyri at fáa lógfesta góðkenning.

**2. stk.** Sum hvílandi limir kunnu verða tiknir sjúkrarøktarfrøðingar, búsitandi í Føroyum ella aðra staðni, sum ikki starvast sum sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum.

**3. stk.** Sum heiðurslimir kunnu útnevnast sjúkrarøktarfrøðingar ella onnur, sum á serstakan hátt hava uppiborið tað.

**4. stk.** Sjúkrarøktarfrøðingar, sum lima seg inn í felagið seinni enn 3 mánaðir eftir at teir hava fingið rætt til limaskap smb . § 3, stk . 1, kunnu ikki krevja juridiska ella fíggjarliga hjálp fyrr enn 1 ár eftir innliman . Sama er galdandi fyri limir, sum lima seg inn eftir at teir hava mist síni rættindi sum limir smb . § 6, stk. 1, 2 og 3.

## RÆTTINDI OG SKYLDUR

### § 4.

**1. stk.** Allir limir eru valbærir og hava atkvøðurætt til álitisstørv felagsins sambært reglunum í hesum viðtøkum. Undantiknir eru hvílandi limir, ið virka innan aðrar starvsgreinar ella ikki hava bústað í Føroyum, hesir hava atkvøðurætt, men eru ikki valbærir.

**2. stk.** Góðkendu sjúkrarøktarfrøðingarnir fáa merki Felag Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga. Merkið er ogn felagsins og skal latast aftur, tá viðkomandi hevur sagt seg úr felagnum, er útihýstur úr tí ella er deyður.

**3. stk.** Limir kunnu bert taka við størvum, um Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur góðkent lønar-, setanar- og eftirlønarkorini.

**4. stk.** Limir hava skyldu at boða Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar frá broytingum av skrásettum upplýsingum, m. a. limaskapi, bústaðarbroytingum, skifti til annað starv ella arbeiðsøki.

## AT SIGA SEG BURTUR ÚR FELAGNUM

### § 5.

**1. stk.** Ætlar limur at taka seg burtur úr felagnum, skal boðað verða frá ein mánað frammanundan til endan av einum mánaði. Boðað skal verða Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar skrivliga frá hesum.

**2. stk.** Ikki ber til at taka seg úr felagnum, so leingi ávarað er um ósemju, ella so leingi ósemja er millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og arbeiðsgevara, sum limurin arbeiðir undir.

## ÚTIHÝSING

### § 6.

**1. stk.** Limur, sum ikki hevur goldið limagjald í meira enn tveir mánaðir á rað, missir síni rættindi sum limur.

**2. stk.** Stýrið kann útihýsa lim, sum ikki heldur viðtøkur felagsins ella noktar at gera eftir lógligari avgerð ella sýnir vanvirðing fyri felags áhugamálum.

**3. stk.** Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar útihýsir lim, sum fyribils missir rættin at starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur.

**4. stk.** Limur, sum sjálvkravdur hevur frásagt sær rættin at starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur, møguliga fyri avmarkaða tíð, kann gerast hvílandi limur.

**5. stk.** Avgerð stýrisins sambært 2. stk. kann viðkomandi limur skjóta inn fyri fyrsta aðalfund, um so er, at kært er í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerð er tikin um at útihýsa.

## LIMAGJALD

**§ 7.**

**1. stk.** Aðalfundurin ásetur limagjaldið fyri komandi álmanakkaár.

**2. stk.** Stýrið ásetur gjøllari reglur fyri inngjalding av limagjaldi.

**3. stk.** Formaðurin kann loyva, at limur sleppur undan at gjalda limagjald ella lata minni gjald, um heilt serlig viðurskifti tala fyri tí.

## ÁLITISFÓLK

### § 8.

**1. stk.** Á hvørjum tænastustaði, har virknir limir starvast, velja teir eitt ella fleiri álitisfólk millum sín eftir reglunum niðanfyri. Uppgáva teirra er at umboða áhugamál limanna á staðnum.

**2. stk.** Starvast í minsta lagi tríggir virknir góðkendir limir, skulu teir velja eitt álitisfólk.

## VALRÆTTUR, VALBÆRI OG UPPGÁVUR

### § 9.

**1. stk.** Hvør virkin limur hevur valrætt og valbæri, samanber kortini í 2. stk.

**2. stk.** Hægsti leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á stovni e.t. ella varafólk hjá viðkomandi og sjúkrarøktarfrøðilesandi kunnu ikki verða vald og hava ikki atkvøðurætt til starvið sum álitisfólk.

**3. stk.** Val av álitisfólki fevnir um tvey ára skeið. Afturval kann verða. Um so er, at starvið verður leyst, tekur tiltakslimur við tað, sum eftir er av valskeiðinum. Fáa fleiri eins nógvar atkvøður, skal kastast lut. Val skal verða hildið í novembur mánaði líka ár.

**4. stk.** Álitisfólk stovnsins skulu velja felags álitisumboð sínámillum. Tiltakslimur skal veljast fyri álitisumboð sjúkrarøktarfrøðinga. Somu reglur eru galdandi sum fyri álitisfólk, hvat valskeiði og umvali viðvíkur.

**5. stk.** Beint eftir val skal Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar boða arbeiðsgevaranum frá, hvør er valdur.

**6. stk.** Álitisfólkið umboðar virkna góðkenda limin á sínum valøki og røkir áhugamál limanna.

**7. stk.** Teir trupulleikar, sum støða ikki kann verða tikin til á staðnum, ella sum er av grundleggjandi týdningi, skulu leggjast fyri stýrið.

## STÝRIÐ

**§ 10.**

**1. stk.** Stýrið við í mesta lagi 5 limum leiðir arbeiði felagsins.

**2. stk.** Allir limir, samanber við grein 4. stk. 1, eru valbærir til stýrið og hava rætt at velja. Treyt fyri at kunna veljast sum nevndarlimur er, at viðkomandi hevur verið limur í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í minst eitt hálvt ár.

**3. stk.** Val til stýrið fer fram í mars/apríl mánaði annað hvørt ár millum tey valevni, sum tilmeldað eru í seinasta lagi 1. februar kl. 16:00. Nýggja stýrið tekur við eftir aðalfundin. Formaðurin verður valdur fyri seg. Fer formaðurin frá í valskeiðinum, tekur næstformaðurin við eftir hann, til nýval kann verða hildið.

**4. stk.** Stýrið ásetur gjøllari reglur fyri valið.

**5. stk.** Tey valevni, sum fingu flestar atkvøður av teimum, ið ikki vórðu vald, verða roknaðum tiltakslimir. Tiltakslimur tekur sæti í nevndini, tá nevndarlimur fer frá í ótíð ella er burtur longri tíðarskeið. Nevndin tekur í hvørjum einstøkum føri avgerð. Tiltakslimir verða valdir fyri 2 ár í senn.

**6. stk.** Stýrið skipar seg í seinasta lagi 14 dagar eftir nýval við næstformanni og skrivara.

**7. stk.** Um so er, at stýrislimur uttan at hava boðað frá forfalli ikki kemur á tveir stýrisfundir á rað, kann stýrið taka sessin frá honum, soleiðis at tiltakslimur tekur við honum.

**8. stk.** Valskeiðið er fýra ár. Formaður og tveir nevndarlimir verða valdir aðru hvørja ferð, og aðru hvørja ferð tveir nevndarlimir. Afturval kann fara fram.

**9. stk.** Felagið rindar nevndarlimum mánaðarliga samsýning fyri nevndararbeiði. Hendan samsýning verður ásett í mun til, hvat tíð verður brúkt til nevndararbeiði.

**STARVSSKIPANIN**

**§ 11.**

**1. stk.** Stýrið heldur vanliga fundir, ið vara ein ella tveir dagar, eina ferð um mánaðin ella so ofta, sum formaðurin heldur tað vera neyðugt, ella tá í minsta lagi tríggir limir hava latið formanninum skrivligt krav við uppskoti um grundgivna dagsskrá.

**2. stk.** Formaðurin leiðir stýrisfundirnar, og tá hann hevur forfall, næstformaðurin . Stýrið er viðtøkuført, tá í minsta lagi helvtin av limunum er á fundi. Ein og hvør avgerð verður tikin við vanligum atkvøðumeiriluta. Stýrið ásetur annars eisini sjálvt starvsskipan sína.

**STARVSØKI**

**§ 12.**

**1. stk.** Stýrið, sum leiðir felagið samsvarandi viðtøkunum og teim avgerðum, aðalfundurin hevur tikið, hevur alla heimild at virka felagsins vegna og at seta tey starvsfólk, ið eru neyðug.

**2. stk.** Stýrið kann skuldbinda felagið fíggjarliga, um formaðurin skrivar undir. Hevur hann forfall, kann næstformaðurin skriva undir saman við einum øðrum stýrislimi, sum stýrið hevur tilnevnt. Verður føst ogn keypt, seld, pantsett ella á annan hátt sáttmálabundin, er neyðugt at tveir nevndarlimir, saman við formanninum, skriva undir. Til keyp, sølu og pantseting av fastari ogn krevst aðalfundarsamtykt.

**3. stk.** Stýrið hevur ábyrgd av, at ognir felagsins, sum ikki eru neyðugar í dagliga rakstrinum, verða tryggiliga varðveittar, soleiðis at váðin fyri, at ognir felagsins missa virði, er so lítil sum tilber. Reiður peningur, sum ikki skal nýtast beinanvegin, skal setast í góðkendan banka, virðisbrøv ella lánsbrøv við so lágum rentu- og kredittváða, sum tilber.

**AĐALFUNDURIN**

**§ 13.**

Aðalfundurin er ovasti myndugleiki í øllum viður skiftum Felag Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga, um so er, at tey skulu til uratkvøðu.

**§ 14.**

**1. stk.** Aðalfundur verður hildin eina ferð um árið í mars/apríl mánaði. Á aðalfundinum verður framlagdur grannskoðaði roknskapur felagsins, og frágreiðing verður givin um virksemi felagsins.

**2. stk.** Boðað kann verða til eykaaðalfundar, tá stýrið heldur tað vera neyðugt, og boðað skal verða, um so er, at 80 limir skrivliga seta fram krav um tað við grundgivnari dagsskrá. Boðað verður til aðalfundar við tilskilaðari dags skrá við lýsing í limablaði felagsins, í føroyskum dagblaði ella í fráboðan, send limunum við í minsta lagi 14 daga ávaring til regluligan aðalfund og 7 daga ávaring til eykaaðalfund.
Uppskot, sum skulu vera viðgjørd á aðalfundinum, mugu vera felagnum í hendi 1. februar.

**3. stk.** Á dagsskránni til aðalfundin skulu vera hesi mál:

1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagsskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum áseting av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum innanhýsis grannskoðarum
9. Ymiskt

**4. stk.** Avgerð verður á aðalfundi tikin við vanlig um meiriluta, samanber kortini reglurnar um avtøku og broytingar av viðtøkum.

## URATKVØÐA

### § 15.

Tá ið í minsta lagi 80 Iimir krevja tað, skal verða uratkvøtt um mál, sum er viðgjørt á aðalfundi. Innan 14 dagar eftir aðalfund, har avgerð er tikin um uratkvøðu, sær stýrið til, at atkvøtt verður. Um so er, at meiriluti av greiddum atkvøðum er ímóti tiknu avgerðini, fellur hon burtur.

## LESANDI

**§ 16.**

**1. stk.** Sjúkrarøktarfrøðilesandi hava rætt at virka samsvarandi viðtøkum Felag Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga gjøgnum talsfólk og feløg hjá lesandi.

**2. stk.** Talsfólk røkja áhugamál teirra lesandi á staðnum eitt ár í senn.
Felagið styðjar í arbeiði tess lesandi í tann mun, limaskapur teirra gevur rætt til.

**3. stk.** Stýrið ásetur gjøllari reglur fyri arbeiðið hjá teimum lesandi.

## FAKLIGIR ÁHUGABÓLKAR

### § 17.

**1. stk.** Við góðkenning frá felagnum kunnu stovnast fakligir áhugabólkar av limum, sum hava sama fakliga arbeiðsøki.

**2. stk.** Uppgávur áhugabólkanna eru:

- at virka fyri felagsligum samanhaldi millum limir áhugabólkanna og at stuðla hvør annan at fremja felags útbúgving og arbeiðsuppgávur,
- at vera við at hjálpa limunum, so teir gerast alsamt meiri dugnaligir, m. a. við at halda fundir og skeið,
- at eggja til kanningar og stuðla kanningum arbeiðsøkinum viðvíkjandi
- at vera við at menna heilsu- og sjúkrarøktina.

## SAMBAND VIÐ ONNUR FELØG

### § 18.

Við heimild frá aðalfundinum kann stýrið gera avtalur:

**a.** um sínámillum limaskap við onnur sjúkrarøktarfrøðingafeløg

**á.** um samráðingarrættin hjá sjúkrarøktarfrøðingum innan fyri fast avmarkað tilnevningarøki, soleiðis at hann verður fluttur til onnur feløg við eini sínámillum marknasemju ella við felags innskriving í annað felag.

**b.** samgonguskipanir o. t. við onnur feløg, hvørs limir starvast á skyldum økjum

**d.** um felags limaskap í heimafeløgum og altjóða feløgum.

## ROKNSKAPUR OG GRANNSKOÐAN

**§ 19.**

**1. stk.** Roknskaparár Felag Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga er álmanakkaárið.

**2. stk.** Áðrenn nýtt roknskaparár byrjar, verður greint uppskot um fíggjarætlan lagt fram fyri aðalfundin til góðkenningar.

**3. stk.** Við endan á hvørjum roknskaparári verða sett upp rakstrarroknskapur og fíggjarstøða, sum aðalfundurin góðkennir. Statsgóðkendur grannskoðari skal frammanundan hava kannað rakstrarroknskapin og fíggjarstøðuna.

**TRYGDARGRUNNURIN**

**§ 20.**

**1. stk.** Av limagjaldinum hjá virknu limunum verður árliga peningur lagdur í Trygdargrunnin, haðani peningur bert má nýtast til ósemjumál, og fyribyrgjandi átøk móti ósemjum, sum stýrið metir eru gagnlig fyri limirnar/felagið.

**2. stk.** Rentur og annar vinningur grunsins mugu ikki verða nýtt til vanligan rakstur av felagnum. Heldur ikki má stovnsfæið fara niður um kr. 9,0 mió.

**3. stk.** Peningur grunsins verður varðveittur sambært reglunum, ásettar í § 12, 3. stk.

**4. stk.** Stýrið situr fyri trygdargrunninum.

## HJÁLPIGRUNNURIN

### § 21.

**1. stk.** Av limagjaldinum hjá virknu limunum verður settur av eina ferð um árið peningur, sum aðalfundurin ásetur, og sum bert kann verða nýttur at styðja limir, ið antin av sjúku, arbeiðsloysi ella slíkum eru komnir í fíggjarligar trupulleikar.

**2. stk.** Stýrið situr fyri grunninum.

**3. stk.** Til ber eisini at nýta pening av rentuni til at varðveita søgu sjúkrarøktarfrøðinga í Føroyum.

## STUDNINGSGRUNNURIN

### § 22.

**2. stk.** Í grunninum skal stovnsfæið vera minst 1,4 mió. Peningur oman fyri stovnsfæið verður nýttur til at styðja limir, sum nema sær kunnleika í heilsu-, sjúkrarøkt her, í øðrum londum og til fyrisitingarliga útbúgving. Møguleiki er at stuðla tiltøkum og einstaklingum, sum arbeiða við at menna heilsu-, sjúkrarøkt og fyrisitingararbeiði og í serstøkum føri til upplýsandi og mennandi tiltøk.

**3. stk.** Stýrið situr fyri grunninum.

## MENNINGARGRUNNURIN

### § 23.

**1. stk.** Navn grunsins: Menningargrunnurin hjá Sjúkrarøktarfrøðingum.

**2. stk.** Uppgávur og endamál grunsins: Grunnurin skal savna og fáa til vega pening og býta henda út sambært endamálinum, uttan so at peningurin er ætlaður til bundna fæ grunnsins.

Endamál grunsins er: At stuðla gransking- verkætlanum og førleika hjá Sjúkrarøktarfrøðingum.

**3. stk.** Grunnurin er stovnaður tann 15 .mars 2003

**4. stk.** Stýrið situr fyri grunninum.

## VØKA

### § 24.

Stýrið fær í lag útgávu av tíðarriti og ásetur reglur fyri blaðstjórn og fyrisiting.

## FRÁBOÐAN UM ARBEIÐSSTEÐG

### § 25

Avtalan millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar frá 1. juli 2014 um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi kann hvørki broytast ella sigast upp uttan at broyting ella uppsøgn fyrst er góðkend á eykaaðalfundi.

## TULKINGARSPURNINGAR

### § 26.

**1. stk.** Stýrið avger við vanligum meiriluta ósemjur viðvíkjandi tulking av hesum viðtøkum. Tó skal avgerðin um henda tulkingarspurning leggjast fyri aðalfundin, um so er, at ein stýrislimur setur fram ynski um tað. Um so verður, skal avgerð stýrisins kortini galda, inntil aðalfundurin møguliga broytir hana.

**3. stk.** Aðalfundurin tekur við vanligum meiriluta endaliga avgerð um kærda tulkingarspurningin.

## BROYTINING AV VIÐTØKUM

### § 27.

**1. stk.** Broyting av hesum viðtøkum kann samtykkjast á vanligum aðalfundi eins væl og eykaaðalfundi, eftir at uppskot er lagt fram um tað, og um í minsta lagi 2/3 av greiddu atkvøðunum eru fyri broytingini. Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá í minsta lagi 60 limir eru á fundi.

**2. stk.** Taka færri enn 60 limir lut í atkvøðugreiðsluni, kann broytingin av reglugerðini verða samtykt at hava gildi við vanligum meiriluta á eykaaðalfundi, sum skal verða hildin innan 2 mánaðir.

## AVTØKA

### § 28.

Um so er, at aðalfundurin við í minsta lagi 2/3 meiriluta samtykkir at taka av Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, skal stýrið fáa í lag, at uratkvøtt verður sambært reglum um hetta . Fyri at avgerð um avtøku av felagnum skal hava gildi, er kortini neyðugt, at í minsta lagi 3/4 av øllum virknum limum, og limum fráfarnir við eftirløn, atkvøða fyri tí við uratkvøðu . Verður síðani samtykt at taka felagið av, skal aðalfundurin avgera, hvat gerast skal við ognir felagsins.

## GILDI

**§ 29.**

Viðtøkurnar fáa gildi 1 . oktober 1988 .

Aðalfundurin góðkent við broytingum 16 . mars 1989 og 31 . mars 1990 .

Broytingar viðtiknar á eykaaðalfundi 28 . mai 1991 .

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 25 . mars 1995 og 23 . mars 1996

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 21 . mars 1998

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 9 .mars 2002

Broytingar viðtiknar á eykaaðalfundi 12 . oktobur 2002

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 15 .mars 2003

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 17 . mars 2007

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 15 . mars 2008

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 17 . mars 2012

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 10. mars 2018

Broytingar viðtiknar á aðalfundi 13. juni 2020